## Roynir aftur

Tórshavnar kommuna ger nú enn eina roynd at broyta byggisamtyktina fyri økið við Sjógv í Kollafirði, so kollfirðingar kunnu sleppa at byggja sær eina nýggja kirkju millum landsvegin og Sjóvará. Tá kommunan royndi fyrru ferð, kom ein kæra ímóti broytingini, men nú hevur kommunan gjørt eina øðrvísi broyting í samráð við tann, sum kærdi fyrru ferð. Nú hevur kommunan so sent innle3ndismálaráðnum broytingina til góðkenningar.

## Hóttir samgonguna

Meirilutin í grønlendska Landstinginum hevur gjørt av at broyta eina reglugerð um, hvussu veiðan hjá rækjutrolarum skal gerast upp. Broytingaruppskotið skal eftir ætlanini hava 2. viðgerð tann 30. apríl, men nú sigur flokkurin IA, at hann fer burtur úr landsstýrissamgonguni, um broytingin verður samtykt. IA sigur, at politikarar, sum eru fyri at broyta reglurnar, hugsa bara um løtuvinning, og tað vil flokkurin ikki vera við til.

# ytt eftir einum sekundi



*úti fyri ferðsluvanlukku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Vanlukkan hevur ávirkað Annie so nógv, at hon ikki fyrr enn nú, næstan tvey ár seinni, byrjar at koma fyri seg. Men enn kann hon fáa niðurtúrar og eisini knappliga spýggja ógvusliga uttan grund.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Tað var undarligt. Hon tosaði, men tað var einki skil í tí, hon segði, greiðir Allan Samuelsen frá.

Sjálv minnist Annie sum nevnt einki, men heldur, at hon á ein hátt má hava verið klár kortini.

Minnið byrjaði tó at koma aftur, og so skjótt tað hendi, ynskti Annie at sleppa heim.

- Eg hugsaði um Joan, og um tann skelk, ið hon hevði fingið. Eg vildi sleppa heim til hana sum skjótast, sigur Annie, sum heldur, at dótturin er tann, ið er mest ávirkað av hesi meiningsleysu ferðsluvanlukkuni.

### Einki sjónligt mein

Brek á hypofysuna er heilt óvanligt fyribrigdi í Føroyum, og tað hendir so sjáldan, at læknarnir ikki vóru reiðiliga greiðir yvir, hvussu teir skuldu fyrihalda seg. Til dømis fekk Annie saltdrop og saltmolar at súgva, men hetta vísti seg at vera heilt skeivur háttur at viðgera hana. Tvørturímóti má hon í dag ikki drekka ella á annan hátt inntaka meiri enn ein litur av vætu um døgnið. Og tá er alt íroknað.

- Tað kann vera vatn ella tað kann vera kaffi. Men eg má eisini rokna sós, frukt og alt annað við vætu í upp í tann eina liturin um døgnið, sigur Annie Joensen.

Tað er natriumtalið, ið ávirkar hypofysuna, og gerst tað talið ov lágt, ávirkar tað bæði kropp og sinni.

- Ja, tað hevur ikki altíð verið líka lætt, og Annie sigur sjálv, at hon heldur vildi havt eitt arr á skinnið enn tað arr á sinnið, sum hon hevur, sigur Allan Samuelsen.

Og rætt er tað, at tú als ikki sært á Annie, at hon hevur verið úti fyri einari so álvarsligari vanlukku.

- Tað hevur verið ótrúliga tungt at koma ígjøgnum, og tá fólk so siga við meg, at nú eri eg komin yvir tað, so vita tey slett ikki, hvat tey tosa um. Tey hava onga hóming av tí, sum eg havi verið ígjøgnum, sigur Annie.

### Gloymir alt

Eitt annað, sum vanlukkan hevur ávirkað sera nógv, er minnið. Annie gloymir stutt sagt alt.

- Eitt, sum eg kortini ongantíð gloymi aftur er ein dagin, eg júst var liðug at gera døgurða. Eg hevði steikt okkurt og í tankaloysi legði eg hondina á glóðheitu pannuna, greiðir Annie frá.

Nógv av tí, hon gloymir, hevur eyðvitað ikki so nógv upp á seg, men sumt er beinleiðis vandamikið. Hon kann til dømis gloyma at sløkkja pláturnar á komfýrinum, og øll vita, hvussu vandamikið tað kann verða.

- Nú havi eg fingið mær tað fyri, at skriva á fartelefonina tað, eg skal minnast til, so ringir hon og sigur frá. Eisini skrivi eg niður á gulu postit seðlarnar, um til dømis onkur ringir og eg so skal minnast eitthvørt til dagin eftir, sigur Annie Joensen.

- Ofta kann eg vakja í fleiri døgn, men eg kenni meg kortini ikki móða ella lina. Til aðrar tíðir má eg liggja og halda mær fast í seingini, tí eg kenni tað, sum skal eg detta á gólvið – eins og eg eri í ringasta illveðri, sigur Annie.

Ofta hevur hon kent seg noydda at dragsa seingina hjá yngru døttrini, Sólvá, yvir til sína song at forða